

*Magnus í Hjøllum ger klárt at fara til útróðrar í gjárkvøldið. Tað verður triði túrurin í ár*

Óli P 70 ár

Móttøka í Miðlahúsinum



Í sambandi við at Óli P verður 70 ár týsdagin 24. januar verður móttøka í Miðlahúsinum henda dagin frá kl. 15 til 17.

Øll eru vælkomin

miðlahúsið
í Vágsbotni

# – Teir søgdu at eg fór at dumma meg

**Meðan floksfelagarnir valdu at fara í starvsvenjing í heilsølum og aðrastaðni, so vildi Búi í Hjøllum tað øðrvísi: Hann vildi royna lívið sum útróðrarmaður**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Toftakaj:** – Eg hevði bara hug at royna okkurt annað! Í egningarskúrinum hjá Beintu standa fýra mans og egna. Umframt Magnus sjálvan, so stendur bróðursonur hansara eisini har.

Og tað ger hann, hóast tað er týsmorgun og talan ikki er um nakra feriu frá skúlanum.

Støðan er einfalt hon, at Búi er farin í starvsvenjing hjá Magnusi – í starvsvenjing sum egnari og útróðrarmaður.

– Eg søkti hetta og fekk tað eisini, sigur Búi, sum er staddur mitt í einum stampi.

Hann hevur roynt áður at egna, og klárar hann vanliga at egna ein stamp eftir hálvumøðrum til tveir tímar.

## Hug til sjógvin

Vanliga fara næmingar í t.d. starvsvenjing á skrivstovum, frisørsalongum og heilsølum.

Men Búi vildi tað øðrvísi. Hann hevði hug at royna sjólívið sum útróðrarmaður.

– Ja, eg hevði faktiskt eisini havt hug at verðið útróðrarmaður, sigur hann.

Men áðrenn hann kemur so langt, er neyðugt at stamparnir eru egndir og klárir at flyta umborð á Beintu.

Tað arbeiðið byrjaðu teir longu uppá fyrsta dagin í starvsvenjingini, har hann eisini var við, tá teir keyptu agn.

Ígjár varð so hildið fram við tí sama. Og óhugsandi var ikki, at hann fór á sína fyrstu útróðrarferð í gjárkvøldið.

– Tað er so í øllum førum ætlanin, svarar Magnus til.

## Vánaligt veður

Nógvir dreingir hava egning sum eitt av ítrivum sínum í frítíðini. Og tað hevur Búi eisini.

Hann hevur egnt fleiri stampar, og brúkar vanliga niðanfyri tveir tímar uppá stampin.

Floksfelagar hansara eru í starvsvenjing á ymiskum støðum kring landið, m.a. eru fleiri innanfyri radio og elektrisitet.

Tá Búi segði teimum, at hann ætlaði sær í starvsvenjing hjá einum útróðrarbáti, – tá hildu teir lítið um tað.

– Ja, teir søgdu bart út, at eg dummaði meg alvorliga. – Hví?! Jú, teir væntaðu at veðrið fór at vera so vánaligt!!, sigur Búi og brosar.

## Av við sjóverkið

Starvsvenjingin hjá 9. flokki í Tofta skúla byrjaði mánadagin og verður hildið á hesa og komand vikuna. Ymiskt er sjálvandi, hvat næmingarnir fara at fáa burturúr.

Men Búi hevur tó eina ætlan – ella rættari sagt tvær ætlanir – við sínari starvsvenjing:

– Eg ætli mær at sleppa av við sjóverkið.

– Og so er tað eisini praktfult at sleppa undan at vera í skúlanum nakrar dagar!, sigur Búi og grínur.

*– Eg ynski at fáa meiri at vita um útróðrarlívið, sigur Búi í Hjøllum, sum er í starvsvenjing hjá farbróðrinum*

